## Heldur fast við sínar ætlanir

Páll Nolsøe Slættanes, sum nú er 35 ára gamal, hevur altíð fullført tað, sum hann hevur sett sær fyri.

Áðrenn hann lærdi til skipsførara, sigldi hann við línuskipi og síðan við skúlaskipinum "Danmark". Hann búði eina ferð í tríggjar mánaðir í Kina og tríggjar mánaðir í Japan. Hetta gav honum stóran kunnleika um, hvussu ymisk mentanin er hjá heimsins fólkasløgum.

Hugskotið at útbúgva seg til flogskipara fekk hann longu, tá ið hann sum smádrongur ferðaðist í Sandavági og sá flogførini sveima til og frá flogvøllinum.

Slapp hann til tað, las hann alt um flogfør, flogferðslu og flogsøgu Hann helt, at tað hevði verið spennandi at roynt hesar avbjóðandi hestakreftirnar.

Tá ið hann so troyttaðist av at sigla við olju og kemikalium, setti hann sær fyri skjótt at fáa útbúgving sum flogskipari.

Og tað gjørdi hann so.



*Í vinstra partinum á hesum bygninginum arbeiðir Páll Nolsøe Slættanes*


*Í flogførunum hjá teimum er einki við at sita kloynd millum setrini*


*Eitt av stásiligu flogførunum hjá Air Alsie*


*Flogfarið er innan sum ein stásilig stova*


*Flogskiparin stýrir flogferðsluni frá skriviborðinum*

á telduni, kann hann neyvt rokna út, hvar flogfarið skal flúgva, og hvørja tíð tað tekur um at koma fram. Hann fær eisini upplýsingar um møguligar veðurforðingar, ið kunnu vera á leiðini. Flogskiparin fylgir teimum upplýsingum, sum hann fær frá Páll og starvsfeløgum hansara, men flogskiparin hevur altíð evstu ábyrgdina og kann broyta ætlanina, um hann veit t.d., at tað verður turbulensur ella aðrar forðingar, ið gera flúgvingina torføra.

Leiguflogførini, sum Páll Nolsøe Slættanes stýrir frá skrivstovuni, eru ikki innrættað sum vanlig ferðamannaflogfør. Innbúgvið er stórar góðar sofur, sum fólkini sita serliga væl í.

### Vil á flog

Páll Nolsøe Slættanes er fegin um starvið í Danmark, hóast tað kann vera strævið at hava langar vaktir.

Hann vónar inniliga ein dag at fáa starv hjá Atlantsflog, tí hann kundi hugsað sær at flutt heim aftur til Føroya.

Tað kostar nakrar hundrað túsund krónur at útbúgva seg til flogskipara, og fyri at prógvið framvegis skal vera galdandi, skal hann hvørt ár til roynd, ið kostar 8.500 krónur.

Fær hann starv sum flogskipari, skal hann á eitt styttri skeið fyri at flúgva við ferðafólki.